

## Símun heldur fram í Keflavík

Føroyski landsliðsspælarin Símun Samuelsen hevur skrivað undir nýggjan tvey ára sáttmála við íslendska felagið Keflavík. Símun Samuelsen hevur spælt í Íslandi í hálvtannað ár, og í fjør gekk rættiliga væl hjá honum í Keflavík, sum spælir í bestu íslendsku deildini. Hetta hevur fingið felagið at leingja sáttmálan við Símun í tvey ár afturat, og á heimasíðuni hjá Keflavík verður fegnast um, at føroyski spælarin heldur fram í felagnum. Í Keflavík halda tey, at Símun var millum bestu spælararnar hjá Keflavík í fjør.

## EB/Streymur vann stórt á AB

Silvurvinnararnir úr EB/Streymi spældu í gjár venjingardyst ímóti AB, sum í ár skal spæla í bestu deildini fyri fyrstu ferð. Tað var nakað av muni millum liðini, tí EB/Streymur vann 5-1, eftir at støðan var málleys í hálvleikinum. Sambært heimasíðuni hjá AB royndi ein danskur spælari seg fyri fyrstu ferð við AB. Tað var Morten Overgaard, sum spældi í miðverjuni saman við Fróða Clementsen.

Har skal standa: StÍF-VÍF 26-25 (11-14):

# Marian átti seinasta orð

**VÍF var fyri tað nógva ein flokk oman fyri StÍF í steypafinaluni leygardagin. Men teir megnaðu ikki at gera arbeiðið liðugt, tá sálarliga StÍF-trauma'ið gjørdist ov trýstandi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ingi Olsen kundi valla sagt tað á betri hátt enn tað sama, tá hann gjørdi sínar viðmerkingar í upptaktini til steypafinaluna. Mest rutineraði vestmenningurin av øllum staðfesti, at skuldi finalan vinnast, so skuldi hetta gerast í høvdinum.

Hann kundi kanska eisini vent tí eitt sindur á høvdið, tí var tað nakað stað, at vestmenningar taptu finaluna leygardagin, so var tað júst í høvdinum.

### Vórðu skjótt fýstir

Stóran part av dystinum vóru tað nevnliga teir gulu, sum høvdu greiða yvirvág. Strandingar framdu mundandi fleiri mistøk, enn teir vanliga gera í slíkum dysti, og aloftast vóru vestmenningar menn fyri at revsa hesi. Sjálvt Marian Cirloganescu í málinum tóktist ikki hava ein av sínum skjótt vanligu finaludøgum, og so gjørdist tað serstakliga trupult hjá StÍF.

Tað gingu heldur ikki meira enn smáir 10 minuttir, áðrenn teir tveittu ætlaða trumfin á vøllin. Sveinur Justinussen hevur als ikki spælt í ár, men í evstu løtu varð hann tó meldaður klárur til dystin leygardagin. Ivaleyst var ætlanin, at StÍF við hesum kundi hava eitt vápn, sum skuldi tveitast á vøllin seinastu løtuna, um støðan kravdi tað, men tann parturin av tankanum hvarv so, tá ungi stórskjúttin somikið skjótt varð tveittur inn.

### Eli í hopla

Marian Cirloganescu hevur fyri tað mesta verið eitt við steypafinalur, men leygardagin var tað fyri tað heilt nógva ein annar málverji, sum stjól myndina.

Eli Müller í VÍF-málinum kom heilt skjótt at standa heilt sterkur í myndini. Sum fyrri hálvleikur leið, so gjørdust strandingarnir alt meira frustreraðir, tí líkamikið, hvussu teir bendu skotunum, so tóktist vestmenningurin at standa fyri teimum. Vakrast var kanska dupultbjargingin, sum hevði móti Rúna og Bent ta einu ferðina, men tað stóð øllum sólarklárt, at við hetta lag skuldi tað verða meira enn vanliga trupult hjá StÍF at toga steypið heim við sær.

Eisini tí VÍF nú veruliga hevði fingið sjálvsálit í sítt spæl. Enn vórðu villurnar kanska dekan ov nógvar í tali, men tá málverjin soleiðis borgaði fyri, at flestu av hesum vóru kostnaðarleysar, merkti hetta ikki sjálvsálitið. Eitt sjálvsálit, sum bara øktist, eins og munurin á talvuni eisini gjørdi tað.



*Marian Cirloganescu átti enn eina ferð seinasta orðið í steypafinaluni. Hóast nøkur sekund vóru eftir, so tustu spælararnir innn í brotsteigin, har málverjin varð fagnaður til tað stóra gullmerkið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Skuldu stongt dystin

At strandingar byrjaði nakað nógv meira offensivt eftir steðgin, endurskapti aftur vónina um eina spennandi finalu. Tó at vestmenningar fyrstu longu løtuna hildu tørn í sannari málveitslu, so var vissan í spælinum ikki longur tann sama. Teir gulu tóktust brúka nógv fleiri kreftir til hvørt einstakt av sínum málum,

Eli var heldur ikki longur sami múrurin, sum hann var tað fyri steðgin, og eitt skifti sendu vestmenningar sjálvan figgjarmálaráðharran at verja netið millum stólparnar.

Hetta munaði eisini eina løtu. Tá farið varð undir seinasta sættapartin av dystinum, høvdu vestmenningar strítt seg upp á fimm-mála leiðslu, og so skuldi tann dysturin verið avgjørdur.

### Taptu sálarkríggið

At tað kortini ikki gekk so, eru helst fleiri orsøkir til.

## FAKTA

**StÍF-VÍF 26-25 (11-14)**
Støður í dystinum
**10 min:** 5-5
**20 min:** 9-9
**40 min:** 17-20
**50 min:** 21-23
**Málskjúttar**
**StÍF:** Jakob Jónsson 7, Leivur Justinussen 5(5), Sveinur Justinussen 3, Bárður Danielsen 3, André F. Danielsen 3, Finnur Hansson 3, Mortan Hansen 2, Borgar Danielsen 1
**VÍF:** Áki Olsen 8(1), Regin Joensen 6, Agnar Joensen 4, Sámal Joensen 3, Ingi Olsen 3, Harald Bjørgvin 1
**Brotskøst:** StÍF 7/6, VÍF 2/1
**Útvísingar:** StÍF 3, VÍF 5
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen